Hygg og Hoyr

Sjónvarp Føroya

Fríggjadagin kl. 21.00:

Elvis - 4:13

Elvis, Scott og Bill gera av at fara út at ferðast sum tónleikarar. Men tað er torførari at arbeiða saman, enn teir høvdu hildið. Felagsskapurin er ikki so sterkur longur, og tað er bilurin heldur ikki.

Michael St. Gerard spælir Elvis Presley

Fríggjadagin kl. 21.25:

Perry Mason

- am. filmur

Kendi krimi-rithøvundurin David Hall hevur latið nógv doyð í bókum sínum — nú gerst hann sjálvur offurið. Góði vinurin hjá Perry Mason, forleggjarin Jordan White, verður ákærdur, og Perry Mason átekur sær at vera verji.

Raymond Burr er aftur advokaturin.



Perry Mason (Raymond Burr)

Fyrivarni verður tikið fyri broytingum

Jack og Bent við hús

Leygardagin kl. 16.50:

Menninir í torninum

Tveir, sum fyrr vóru í sletupatruljuni, vórðu verandi í Grønlandi. Teir búgva púra einsamallir í einum kontroltorni, fleiri hundrað kilometrar frá nøkrum býi.

Steen Yssing kom framvið og varð nakrar dagar.

Leygardagin kl. 20.30:

Rangt og rætt



Lagt til rættis hevur Leivur Hansen

Í sendingini hesaferð luttaka: Lið A: Óli Kurt Hansen, Laura Joensen og Poul Arni Joensen. Lið B: Jógvan Ósá, Annika Toftegaard og Adelborg Linklett.

Leygardagin kl. 21.45:

Tann fremmandi

Amerikanskur filmur frá 1946. Leikstjórin Orson Welles spælir høvuðsleiklutin sum ein rýmdur nazi brotsmaður, sum er í ferð við at skapa sær nýggja samleika — at gerast amerikanari av reinum slag.

Leygardagin kl. 23.20:

Flytidagurin

Amerikanskur filmur frá 1987 við Candice Bergen. Tað fer illa við innbúgvinum, tann dag, Barbara flytur. Og so fara bæði flytifólk og fyrrverandi maðurin at hugsa gjøllari um liv teirra . . .

Sunnudagin kl. 18.20:

Robinson og Crusoe

Í allari vatnflóðini møtast tveir menn uppi á einari tekju. Teir skilja ikki hvønn annan, og báðir ætla okkurt, men ikki tað sama, so teir fara til hendurs. Men alt verður bert stuttligari av hesum . . .

Sunnudagin kl. 19.55:

Manna millum

Í sendingini hitta vit Petur Nolsøe, sum sigur frá um tær mongu dúgvurnar og dúgvusløgini, hann hevur á garði sínum.

Gunnar Justinussen, sum júst hevur givið út eitt country band, er at hoyra í rossastallinum.

Manna millum hittir Óliviu Joensen í Leirvík — hon sigur frá um »Hitt flúgvandi kuffertið«, ið hevur meira enn hálvthundrað ár á baki.

Í Gjógvará oman fyri Vágs bygd kundi vanlukka staðist av spæli millum hálvvaksnar dreingir — prátað verður við dreingirnar.

Fyri meira enn seksti árum síðani sprongdu porkeningar Robbinshellu burtur — nógvir rútar brotnaðu í bygdini. Var steinurin íbygdur?

Lagt til rættis
Ella Smith Clementsen
Hittist á tlf. 15616

Sunnudagin kl. 21.35:

Ítróttur



Í sendingini »Ítróttur« fara vit m.a. at hoyra um judo.

Sunnudagin kl. 22.10:

Heyggurin



Sean Connery

Filmur við Sean Connery, har hann er ein ráur »undirofficerur«, sum átalar korini á einari hernaðar fangalegu.

Filmurin er svart/hvítur frá 1965 og prógvar, at Connery dugir annað enn at vera James Bond.

Týsdagin kl. 21.10:

Horvnir danir

Á hvørjum ári hvørva 9.000 danir. Og »Lundeborg-sakin« er um eitt ungt par, Susanne, sum er 19, og Niels, sum er 28. Ein morgun í sept. 1976 fóru tey um borð í ein bát í Lundeborg Havn. Síðani hevur eingin frætt frá teimum. Eru tey druknað, ella er hetta ein ætlan, tey høvdu?



Koyriprógvið hjá Niels